gult cyan magenta svart

Foreldur eru skelkað:

Óskiljandi at Ulrike er meldað

– Ulrike Steuerwald er einasti læknin, sum hevur kunnað vístá, hvat er galið við barni mínum, sigur Elna Nón, mamma at einum dreingi, sum Ulrike hevur kannað. Eisini er hon skelkað av, at læknin er meldaður fútanum, tí hon hevur gjørt so nógv fyri tey sjúku børnini

GENKANNING
Stefan í Skorini

Elna Nón eigur ein drong, sum hevur sjúkku. Hon heldur meldingina av læknanum vera óskiljandi

Elna Nón eigur ein 5 ára gamlan drong, sum hevur verið við í hesi genkanningini hjá týska læknanum Ulrike. Okkurt er galið við stofskiftinum, og tí er hann sera rørslutarnaður.

Ulrike Steuerwald hevur arbeitt nógv við drongin-um, og Elna Nón sigur, at hon er einasti læknin, sum hevur vitað, hvat er galið við barninum. Onnur børn aðrar diagnosur, men Ulrike hevur síðani rættað hesar diagnosurnar.

– Tískil hevur hon kunna tosað við okkum um teir veruligu trupuleikarnar. Vit og hon kunnu útfrá tí hjálpa børnunum betri og skilja tey betri. Vit hava ígjøgnum hana fingið kostískoytir, sum vit ikki kundu fingið her annars og sum eisini hjálpa, sigur Elna Nón.

Elna Nón sigur seg ikki skilja, at nakar kann melda Ulrike til fútan, tí hon er kend fyri at vera sera arbeiðssom og at hava eitt stórt hjarta fyri sínum sjúklingum.

–Mangan hava vit følt, at hon hevur verið okkara bønarsvar, sigur Elna.

Elna sigur, at vit mugu góðtaka, at tøknin er komin so langt, sum hon er, og at tey sum foreldur vilja gera alt fyri at hjálpa sínum børnum.

– Tað er meira óetiskt ikki at gera kanningina og lata standa til enn at gera kanningina og møguliga fáa hjálp til børnini, sigur Elna.

– Um vit finna vit sjúka genið, so kann tað vera, at viðgerð er at fáa. Tí má sjúka genið finnast, slær Elna Nón fast.

Elna sigur, at tey, sum eru berarar av hesum sjúka geninum og ætla sær at fáa børn, nú hava møguleikan at sleppa undan hesi sjúkuni.

— Tøknin er nú komin so langt, at vit kunnu gera nakað. Við at finna sjúka genið, hava vit ein møguleika at hjálpa okkara børnum, sigur Elna Nón at enda.

Granskarin helt seg fara rætt fram

– Eg fekk at vita, at neyðugt var ikki við serligum loyvi frá Vísindasiðsemisnevndini fyri at fara í gongd við mínar kanningar, sigur Ulrike Steuerwald, sum er meldað til løgregluna fyri ólógliga gransking

GRANSKING
Eyðun Klakstein

Týski barnalæknin, Ulrike Steuerwald, helt alt vera í lagi, tá hon fór undir at taka blóðroyndir til sína gengransking

Týski barnalæknin, Ulrike Steuerwald, er ovfarin av støðuni, sum hon er endað í, nú føroyska Vísindasiðsemisnevndin hevur meldað hana til løgregluna.

Vísindasemisnevndin heldur, at hon hevur brotið vísindaliga lóg, tí hon er farin í holt við eina kanning uttan neyðugu loyvini.

Men hetta kemur fullkomiligu óvart á týska barnalæknan.

– Í august mánaði í fjør fekk eg at vita frá formanninum í Vísindasiðsemisnevndini, at neyðugt var ikki við serligum loyvi frá nevndini fyri at fara í holt við mínar kanningar. Tí helt eg, at alt var í lagi, tá eg fór undir taka blóðroyndirnar, sigur Ulrike Steuerwald, sum nú starvast í Hannover í Týsklandi.

Sosialurin royndi fyrr í vikuni at fáa hendur á Ulrike, men tað eydnaðist okkum ikki, áðrenn vit bóru tíðindini um, at hon var meldað til løgregluna. Í gjár fingu vit samband við týska læknan.

Lat blóðroyndirnar frá sær

Ulrike sigur, at hon hevði fingið at vita, at neyðugt var ikki við serligum loyvi frá Vísindasiðsemisnevndini, tí formaðurin metti, at talan var um kliniskar kanningar. Síðani fór hon í holt við at taka neyðugu blóðroyndirnar.

– Tá eg var farin undir at taka fyrstu blóðroyndirnar, fekk eg knappliga at vita frá formanninum í Vísindasiðsemisnevndini, at eg mátti hava loyvi frá nevndini fyri at gera kanningarnar, greiðir hon frá.

Hetta hendi 1. november í fjør, og dagin eftir hevði Ulrike fund við Vísindasiðsemisnevndina um kanningarnar.

– Eg fekk at vita, at eg skuldi steðga kanningunum beinanvegin og søkja nevndina um loyvi at gera hesar kanningar. Eg skilji væl, at føroyingar stúra fyri genkanningum, og tí lat eg eisini allar blóðroyndirnar frá mær, eftir at kanningarnar hjá mær vórðu steðgaðar, sigur týski barnalæknin.

Hon ætlar sær at søkja Vísindasiðsemisnevndina um loyvi at gera kanningarnar, sum nú eru steðgaðar, men hon segði á fundinum við nevndina í november mánaði í fjør, at hesa umsókn kundi hon neyvan lata nevndini fyrr enn í mars ella apríl mánaði, tí alt hetta arbeiðið fer fram í hennara frítíð.

Neyðugt við loyvi

Formaðurin í Vísindasiðsemisnevndini vísir aftur, at hann segði Ulrike, at neyðugt var ikki við loyvi frá nevndini til tær kanningar, sum hon fór í holt við.

– Tað, sum eg svaraði henni uppá, vóru nakrar kliniskar kanningar av sjúklingum, sum hon ætlaði at gera, og til hesar kanningar var ikki neyðugt við serligum loyvi frá okkum. Men tað, sum hon fór í holt við, var meiri umfatandi enn hetta, og til tað krevst loyvi, sigur Høgni Djurhuus, formaður í Vísindasiðsemisnevndini.

– Eg ivisti ikki í, at Ulrike hevur verið í góðari trúgv, men vit verða noydd at taka hetta málið í álvara. Tá vit halda okkum staðfesta eitt brot á lógina, kunnu vit ikki hava málið liggjandi hjá okkum at taka støðu til. Tí hava vit latið løgregluni málið at kanna, sigur hann.

Høgni Djurhuus sigur, at tá nevndin fær formligu umsóknina frá Ulrike Steuerwald, fer hon at viðgera hesa umsókn, hóast granskarin er meldaður til løgregluna.

Nógvir berarar av sjúkuni

Ulrike Steuerwald ætlaði at gera kanningar av eini sjúku, sum nøkur føroysk børn eru rakt av.

Eingin veit við vissu, hvør orsøkin er til sjúkuna hjá børnunum, og tí fór Ulrike í holt við at kanna børnini og familjuna hjá teimum.

– Mítt mál var at staðfesta, hvør sjúkan er og at gera ein einfaldan kanningarhátt, so fólk kunnu fáa staðfest, um tey eru berarar av hesi sjúku, sigur Ulrike Steuerwald.

Hon sigur, at ein út av hvørjum 50 føroyingum er berari av sjúkuni, og um tvey av hesum finna saman, so er 25% møguleiki fyri, at tey fáa eitt barn við sjúkuni.

Seks føroyskar familjur, sum hava ættarbond við hvørjar aðra, eru rakt av skjúkuni. 9 børn hava fingið sjúkuna, og av teimum eru fimm á lívi.

– Soleiðis kunnu tit ikki fara við fólki

– Verða útlendskir granskarar viðfarnir sum eg, fara teir at missa hugin at gera kanningar í Føroyum, sigur Ulrike Steuerwald

GRANSKING
Eyðun Klakstein

– Eg eri kedd og illa við av tí ógvusliga málburði, sum eg havi verð úti fyri.

Hetta sigur týski barnalæknin, Ulrike Steuerwald, sum er meldað til løgregluna fyri ólógliga gengransking, í einum brævi, sum hon fyri jól sendi Almanna- og Heilsumálastýrinum.

Hetta brævið skrivaði hon, eftir at kanningarnar hjá henni vórðu steðgaðar av Vísindasiðsemisnevndini.

Ulrike vísir til ein fund við Vísindasiðsemisnevndina, har hon metti málburðin verða harðan og ófólkaligan. Sama sigur honum eitt bræv, sum er send Landslæknanum um málið.

Vil ikki verða handtikin

– Um aðrir útlendskir granskarar verða viðfarnir soleiðis, fara teir at missa hugin fyri at gera kanningar í Føroyum, skrivar Ulrike í brævinum, sum Sosialurin hevur fingið hendur á.

– Eg havi stóra samkenslu við teimum avvarðandi hjá sjúklingunum, men eg vóni ikki, at eg verði fyri slíkari viðferð aftur, skrivar týski granskarin í brævinum.

Hon vónar, at málið kann verða loyst sum skjótast, so hon kann halda fram við arbeiðnum uttan at óttast fyri, at hon verður handtikin, tá hon kemur aftur til Føroya.

Ulrike Steuerwald kemur aftur til Føroya mánadagin.

Siðseminevndin meldaði

Tað vóru formaðurin og næstformaðurin í Siðseminevndini, sum meldaðu Ulrike Steuerwald til fútan fyri at fara undir gengransking uttan loyvi. Sjúkrahúsleiðarin sigur nú, at allir læknar skulu hava loyvi frá leiðslluni, áðrenn líkandi kanningar skulu gerast

MELDING
Stefan í Skorini

Oddamenninir í Siðseminevndini, formaðurin Høgni Djurhuus og næstformaðurin Richard Schwartson, hava báðir skrivað undir meldingina, sum varð send fútanum fyri jól. Hetta váttar Dorthe Møller Andersen, politiassessor á Fútaskrivstovuni.

Nevndin metti hetta málið vera somikið álvarsamt, at hon gjørdi ikki mætari enn at melda til myndugleikarnar, tí teir meta, at læknin er farin út um sínar heimildir.

Siðseminevndin metir ikki, at nakar hevur loyvi at taka blóðroyndir ætlaðar til genetiskar kanningar uttan loyvi frá nevndini. Tí varð meldingin send fútanum.

Í góðari trúgv

Ulrike Steuerwald sigur sjálv, at í hennara eygum var hetta ein klinisk kanning, og tá talan er um kliniskar kanningar er ikki neyðugt at fáa loyvi frá siðseminevndini.

Jóanis Erik Køtlum, sjúkrahúsleiðari, metir nú, at allir læknar, sum fara undir eitt hvørt virksemi í húsinum skulu hava loyvi frá leiðsluni. Hann sigur, at Ulrike ikki hevur nakað loyvi frá teimum at taka blóðroyndirnar.

Jóanis Erik Køtlum sigur eisini, at í løtuni verður bíðað eftir, at ein mannagongd ísambandi við gransking verður fastløgd. Hesa mannagongd skal politiski myndugleikin syrgja fyri at gera, men enn er einki hent á tí økinum.

Landslæknin onga viðmerking

Tað er landslæknin, sum skal hava eftirlit við læknum í Føroyum. Høgni Debes Joensen, landslækni, vil tó als ikki gera nakra viðmerking til hetta málið.

Heldur ikki hevur hann hug at tosa um generellu uppgávuna hjá landslæknanum, men vísir til ársfrágreiðing landslæknans og til lógina á hasum økinum annars.